

Gongufólk á Veðranesi við Breiðá í baksýni

ur í føroysku ferðavinnuni, sigur hann. Ov lítið verður gjørt við at upplýsa um teir møguleikar, sum hóast alt eru umframt tey stóru hotellini, sum fyri tað mesta er tað, sum gjørt verður burturúr, tá lýst verður.

Í dag eru tvey hotel í Eysturoy. Á Eiði og í Runavík. Men kortini stendur Eysturoy fyri umleið 15 prosentum av samlaðu gistingunum í landinum. Stórur partur av hesum er á vallarheimum, skótahúsum og øðrum støðum, har ferðafólk kunnu fáa eina song.

## Bygdarsøvn

Fleiri bygdarsøvn eru í Eysturoy, og tey verða ov lítið vitjað, halda tey í Ferðavinnuni í Eysturoy. Skuldin kann so liggja ymsastaðni. Men teir eru ikki bangnir fyri at halda, at teir sjálvir hava ein part av skuldini, siga Petur Martin Petersen og Kjartan Dalsgaard.

Eitt nú hevur nýliga verið hildin ein ferðavinnustevna um strandamentan í Norðurhøvum, sum heldur lítið er kunnað um her hjá okkum, heldur Petur Martin Petersen.

Talan er um NORCE tiltakið, sum varð hildið í Eysturoy herfyri, har bygdarsøvnini í oynni vóru miðdepilin.

Eitt nú varð víst, hvussu gamla skjútsskipanin í Føroyum virkaði. Hvussu fólk búðu, og hvat tey ótu.

Og her er heilt víst nakað, vit eiga at taka upp í ferðavinnuhøpi, sigur Petur Martin Petersen. Hetta her at gera burtur úr føroyskum mati.

Mangan – fyri ikki at siga altíð - síggja vit, at tað, sum sett verður á borðið fyri fremmanfólki, er slíkt, tey dagliga fáa heima. Vit hava ein merkiligan hug at halda, at hetta og hatta, sum vit dagliga eta her hjá okkum, vilja tey ikki hava.

Men kanska er tað beint øvugt, heldur Petur Martin Petersen. Hvussu ofta hava vit spurt hesi fólkini, um tey nú heldur vilja hava ein enskan ella franksan búff enn ein bita av eini turrari grindalykkju?

Og so eru tað eisini so vælsignað nógvir møguleikar at gera bæði eitt og annað burtur úr vanligum føroyskum mati. So her er ein – mangan ótroyttur – møguleiki til eisini at gera ferðafólki eina uppliving, sum tey ikki fáa aðrastaðni.

## Matur og náttúra

Náttúran er tað, sum tey flestu ferðafólkini, ið koma til Føroya vilja uppliva. Og tað sleppa tey so.

Vit sita í skótadeplinum á Selatrað. Og júst á Selatrað verða ymsar útferðir gjørdar í náttúruni. Og partur av hesum upplivingum er føroyskur matur.

Tað er Rasmus Skorheim á Selatrað, sum hesi árini, Ferðavinnan í Eysturoy hevur virkað, hevur staðið fyri hesum túrunum, har ein partur er ein matpakki við føroyskum mati.

Hetta tiltakið kom í lag av tí, at Sjóvar Kommuna, sum Selatrað hoyrir til, skrivaði til fólk í kommununi og spurdi eftir hugskotum til eitthvørt vinnufremjandi tiltak í økinum.

Rasmus, sum er bóndi á Selatrað, tók so stig til gongutúrar í haganum við serligum atliti at Eysturoyarsillini, sum er serligt jarðfrøðiligt fyribrigdi í økinum.

Hetta hava verið rímiliga væl umtóktir túrar bæði millum føroyingar og útlendingar, siga tey í Ferðavinnuni í Eysturoy.

## Skipanin

Ferðavinnan í Eysturoy hevur í løtuni tvær kunningarstovur og nøkur kunningarstøð, sum tey nevna tað. Kunnignarstovurnar eru í Fuglafirði og Runavík. Kunningarstøð eru eitt nú á bensinstøðini við Streymin, har brochurur og faldarar liggja.

Raksturin verður í stóran mun lagdur á kommunurnar í oynni. Eitt nú gjalda vertskommunurnar, sum eru Runavíkar- og Fuglafjarðar kommunur, har kunningarsotvurnar eru, eitt sindur meira enn hinar kommunurnar.

Samstarvið í oynni hevur gingið væl, láta teir, Kjartan og Petur Martin, at. Hevur okkurt ivamál ella tílíkt verið, hevur leiðslan verið skjót á staðnum at finna fram til tað, sum ikki riggaði og fingið greitt tað beinanveg, áðrenn tað sleppur at útvikla seg, siga teir. Tað ræður um alla tíðina at hava fingurin á pulsinum og vita, hvussu hann slær.

Brotið varð upp úr nýggjum og byrjað fullkomuliga á botni. Hóast væl er fingið burtur úr hesi 10 árini, er nógv eftir, eru tey í Ferðavinnuni í Eysturoy samd um.

– Møguleikarnir eru nógv fleiri, enn teir, sum verða brúktir, sigur Petur Martin Petersen.



*Ikki øll eru líka von við, at gonguteigurin ikki er púra sléttur. Tað eru slíkar upplivingar, vit skulu selja ferðafólkunum, siga tey i Ferðavinnuni í Eysturoy*